

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 05 - 2013

# Danskir oljupengar fossa í kassan hjá Hess

Amerikanska oljufelagið Hess kærir sína neyð yvir nýggju skattareglurnar í Norðsjónum, men milliardirnar fossa í kassan hjá felagnum. Danmark er eitt av londunum, har Hess forvinnur mest pengar, skrivar Berlingske. Oljufelagið Hess er fyristøðufelag á Syd Arne kelduni. Felagið fekk í 2004 loyvi til at verða verandi á tí gomlu og nógv meira lønandi skattaskipanini, og hevur inntøkan síðani verið so mikið stór, at mong munnu øvunda felagnum. Hetta vísa kanningar, sum Berlingske hevur gjørt út frá roknskapunum frá 1999 til 2011. Síðani framleiðslan byrjaði í 1999 og fram til 2011 hevur felagið forvunnið 11,2 milliardir kr. eftir skatt. Samlaði umsetningurin hevur verið 25,3 mia. kr. Tí lenda 44% av umsetninginum á botnlinjuni skrivar Berlingske. Samlaði skatturin hevur verið 4 mia. kr., og harvið hevur skattaprosentið verið 27. Hess hevur gjøgnum árini gjørt stórar íløgur í útbygging av Syd Arne, men sjálvt um íløgurnar verða tiknar við, so hevur Syd Arne givið eitt avkast, sum í tíðarskeiðnum 2004-2011 hevur verið millum 17 og 34% - eftir skatt. Slíkur vinningur eftir skatt sjálvt í oljuvinnuni er sjáldsamur skrivar Berlingske.. Danska dótturfelagið hjá Hess er eisini at meta sum ein gimsteinur fyri aljtóða oljufelagið Hess Corporation. Um somu tíð sum 5% av samlaðu olju- og gasframleiðsluni hjá Hess samtakinum frá 2004-2011 eru komin úr Danmark, so hevur Hess Danmark latið heili 11,5% av yvirskotinum hjá samtakinum eftir skatt.